# stóran týdning fyri Føroyar




*Loyvi, sum eru latin á føroyska landgrunninum. Aftrat hesum koma loyvi í 3. rundu. Kelda Jarðfeingi*

tann hjá ENI. Sett verður á seint komandi vár ella tíðliga á sumri 2009. Síðani er tað tann nógv umrøddi brunnurin hjá Chevron longur norðuri, skamt frá Rosebankkelduni hinumegin markið. Chevron hevur boðað frá, at tað fer at koma við eini útmelding um ein brunn í sínum loyvi á føroyskum øki í hesum árinum. Møguliga og helst fer henda útmelding at vera tengd at teimum boringum, sum felagið fer undir á Rosebankleiðini í næstum, men sum eru nakað seinkaðar. Tí kann avgerðin um at bora føroysku megin markið verða tikin í 2009 heldur enn nú.

## Atlantsmótið

Vit kunnu tí loyva okkum at gera ta niðurstøðu, at seinastu loyvisrundurnar bæði í føroyskum og bretskum øki komplimentera hvørja aðra. Tær skunda undir útviklingin á Atlantsmótinum sum heild. Íløgur í infrakervi í økinum vestan fyri Hetland, sum í løtuni verða umrøddar millum oljufeløg og myndugleikar, kunnu eisini fáa avgerandi týdning fyri tilgondina sum heild, eisini fyri okkum í Føroyum. Tí fara vit komandi tíðina at hoyra nógv meira til nøvn sum Rosebank og Cambo fundini bretsku megin markið og Anne Marie og Súlan prospektini á føroyska landgrunninum. Umframt allar teir mongu teigarnar, sum komandi árini verða kannaðir á Atlantsmótinum.

Og skulu vit geva orðunum hjá bretska oljumálaráðharranum, Mike O Brien, sum fegnast um úrslitið av seinastu útbjóðingini, gætur, verður eitt nú økið vestan fyri Hetland raðfest sera høgt í bretskum orkuveitingarhøpi í framtíðini. So hóast tøgn enn valdar um okkara leiðir, bendir nógv á, at meiri ferð verður sett á hjólini vestan fyri Hetlandi komandi árini.

Olju- og gassfund og útbyggingarætlanir, mongu leitiloyvini og ikki minst – flaggskipið í oljuleitiflotanum í heiminum í dag – Stena Carron - ger nú klárt til at seta borin í undirgrundina á Atlantsmótinum. Og sum eitt serligt kuriosum - tað er samtíðis at gleðast um, at bæði føroysku oljufeløgini eru við – báðumegin markið.




*Vit síggja loyvi, sum Chevron, StatoilHydro, Dong og OMV hava báðumegin føroyska markið. Eftir øllum at døma fer Stena Carron at bora á føroyska landgrunninum í 2009. Kelda Chevron*



*Stena Carron, flaggskipið innan boriskip í heiminum, fer undir sína fyrstu boring í næstum á Cambofundinum. Helst verður tað hetta skipið, sum fer at síggjast á føroyska landgrunninum í framtíðini*